# Vágsdreingir bestir í Vági

**5-MANNAFØR DREINGIR Tað gjørdi ikki lagið á Jóansøku verri, at dreingirnir umborð á Royndini Fríðu fyri aðru ferð í ár vunnu á argjadreingjum umborð á Bliki**



Tróndur Arge

Tá ið tað eftir ein tíma bíðitíð endiliga eydnaðist at fara undir róðrarnar á nýggja 1000 metra málinum í Vági, eydnaðist tað beinanvegin at geva kappróðrarlagnum millum heimafólkið í Vági eitt lyft.

Tað hevur higartil í ár verið rættuliga tætt millum Blik av Argjum og Royndina Fríða úr Vági, og soleiðis var tað eisini hesa ferð. Tá ið startskotið gelti, sprakk Royndin Fríða fyrst avstað, og so hefti einki fyri vágsdreingjum. Argjadreingir umborð á Bliki og tvøradreingir umborð á Firvaldi royndu at renna aftaná, men Royndin Fríða stýrdi tí mesta, og sigurin tóktist ongantíð at vera í vanda, hóast Blikur bara var eina hálva bátslongd aftanfyri, tá ið bátarnir fóru um málið.

Óvæntað vóru tað skáladreingir umborð á Svani, sum eina løtu bjóðaðu av og hóttu vágsdreingir, og Svanur endaði á triðja plássi. Talan er um góða gongd hjá skáladreingjum. Á Norðoyastevnu vóru teir nummar seks, á Sundalagsstevnu vóru teir nummar fýra, á Eystanstevnu endaði Svanur á sjeynda plássi, og hesa ferð vóru skáladreingir nummar trý. Sammett við vinnarabátin betraði Svanur hesa ferð tíðina við átta sekundum!

Í FM kappingini stendur púra javnt millum Royndina Fríðu og Blik. Bátarnir hava vunnið tvær ferðir í part – aðru hvørja ferð – og so er spurningurin, um mannagongdin verður tann sama, sum hon hevur verið higartil, tá ið tað leygardagin verður kapproður í Vestmanna.

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Royndin Fríða | 04:57.13 |
| 2 | Blikur | 04:58.19 |
| 3 | Svanur | 04:59.19 |
| 4 | Firvaldur | 05:02.21 |
| 5 | Teistin | 05:04.22 |
| 6 | Sílið | 05:06.03 |
| 7 | Jallurin | 05:09.08 |
| 8 | Junkarin | 05:14.00 |
| 9 | Beinta | 05:15.01 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 26 |
| 2 | Royndin Fríða | 26 |
| 3 | Firvaldur | 14 |
| 4 | Teistin | 13 |
| 5 | Jallurin | 12 |
| 6 | Svanur | 12 |
| 7 | Sílið | 8 |
| 8 | Junkarin | 1 |

# Kvinnurnar í Fuglafirði stinnast av øllum

**5-MANNAFØR KVINNUR Sigurin hjá Erlu Kongsdóttir úr Fuglafirði var meiri sannførandi enn nakar av hinum, sum vórðu vunnir á Jóansøku**

Tróndur Arge

Í øllum kappróðrunum á Jóansøku var munurin millum vinnaran og næsta kappingarneytan millum lítil og eingin. Talan var tó um eitt undantak, og tað var í kappingini millum 5-mannaførini við kvinnum.

Kvinnurnar úr Fuglafirði umborð á Erlu Kongsdóttir lótu ongan iva vera. Tá ið Erla fór um málið, var tað væl og virðiliga leyst aftur til Firvald av Tvøroyri.

Fyrra partin av teininum tóktist tað annars sum um, at Erla Kongsdóttir skuldi fáa stóra kapping. Blikur av Argjum leyp avstað, og tað tók sína tíð, áðrenn favorittarnir úr Fuglafirði so at siga fótaðu sær og løgdu seg á odda.

Síðani var eingin ivi. Erla Kongsdóttir róði trygt og sannførandi, og á málinum var munurin aftur til teir næstu væl meiri enn ein bátslongd.

Kappingin um næstfremsta plássið var tøtt. Blikur misti heilt flogið. Drekin, sum hevur verið størsti kappingarneytin hjá Erlu Kongsdóttir, hevði hug at bjóða teimum úr Fuglafirði av, men tað kiksaði, og í staðin var tað Firvaldur av Tvøroyri, sum vann kappingina um næstfremsta plássið.

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Erla Kongsdóttir | 05:16.15 |
| 2 | Firvaldur | 05:21.06 |
| 3 | Drekin | 05:22.23 |
| 4 | Blikur | 05:27.16 |
| 5 | Havfrúgvin | 05:39.01 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Erla Kongsdóttir | 27 |
| 2 | Drekin | 24 |
| 3 | Firvaldur | 20 |
| 4 | Blikur | 17 |
| 5 | Havfrúgvin | 12 |

# Havfrúgvin kneykaði høvuðsstaðnum

**BARNARÓÐUR Fyri fyrstu ferð nakrantíð eydnaðist tað báti aðra staðni frá enn úr høvuðsstaðánum at vinna FM róður í barnakappingini**

Tróndur Arge

Tríggjar tær fyrstu ferðirnar í ár vóru tað Teistin hjá Argja Róðrarfelag og Títlingur hjá Havnar Róðrarfelag, sum vunnu barnakappróðrarnar. Teistin hjá gentunum og Títlingur hjá dreingjunum.

Í Vági vann Teistin fyri fjórðu ferð, og harvið eru argjagenturnar stórfavorittar at vinna FM. Hesa ferð var sigurin so mikið trivaligur á Drekanum og Fípuni Føgru, at tað er ilt at ímynda sær annan vinnara enn Teistan.

Hjá dreingjunum gekk øðrvísi hesa ferð, enn tað hevur gjørt undanfarnu ferðirnar. Havfrúgvin úr Vestmanna hevur verið næstfremst í trimum teimum fyrstu kappingunum, og í Vági eydnaðist tað vestmannadreingjum at taka Títling.

Sigurin var lutfalsiga trivaligur, tí Havfrúgvin kom á mál meiri enn tvey sekund undan Títlingi. Teir tríggir sigrarnir hjá Títlingi eru vunnir við væl minni marginali enn so. Tí kann roknast við, at tað verður spenningur um, hvør fer at vinna FM í hesi kappingini.

**5-MANNAFØR GENTUR**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teistin | 02:33.21 |
| 2 | Drekin | 02:37.06 |
| 3 | Fípan Fagra | 02:38.05 |
| 4 | Spógvin | 02:39.03 |
| 5 | Ørnin | 02:39.23 |
| 6 | Jallurin | 02:40.04 |
| 7 | Beinta | 02:40.15 |
| 8 | Firvaldur | 02:41.24 |
| 9 | Sandingur | 02:44.06 |
| 10 | Svanur | 02:44.20 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teistin | 28 |
| 2 | Spógvin | 21 |
| 3 | Drekin | 17 |
| 4 | Fípan Fagra | 17 |

**5-MANNAFØR DREINGIR**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havfrúgvin | 02:29.13 |
| 2 | Títlingur | 02:31.19 |
| 3 | Drekin | 02:32.10 |
| 4 | Teistin | 02:32.24 |
| 5 | Jallurin | 02:34.19 |
| 6 | Royndin Fríða | 02:36.23 |
| 7 | Junkarin | 02:37.20 |
| 8 | Tambar | 02:39.03 |
| 9 | Frúgvin | 02:39.19 |
| 10 | Sandingur | 02:39.20 |
| 11 | Dúgvan | 02:39.24 |
| 12 | Huldan | 02:43.00 |
| 13 | Heykur | 02:44.50 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Títlingur | 27 |
| 2 | Havfrúgvin | 25 |
| 3 | Drekin | 19 |
| 4 | Teistin | 16 |